# Nýggjur skúlabygningur í Fuglafirði

**Skúlabygningurin, sum Fuglafjarðar kommuna hevur latið byggja niðanfyri verandi skúla, er nú so gott sum liðugur. Í niðaru hæddini eru trý høvuðsrúm, og í ovaru hæddini eru fýra. Kostnaðurin av byggingini er umleið 14,5 miljónir krónur, og tað er Fuglafjarðar kommuna, sum hevur goldið alla byggingina**

SKÚLABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nýggi skúlabygningurin í Fuglafirði stendur nú liðugur*

Í morgin, fríggjadagin 27. august klokkan 17, verður nýggi skúlabygningurin í Fuglafirði alment latin lærarum og næmingum.

Tað verður býráðsformaðurin í Fuglafirði, Sigurd Simonsen, sum fer at lata skúlastjóranum í Fuglafirði, Súna í Hjøllum, lyklarnar til nýggja bygningin. Við hátíðarløtuna á skúlanum, sum verður millum klokkan 16 og 18 hendan dagin, eru eisini fjølmiðlarnir bodnir at vera við. Gentukór fer at syngja, og hornatónleikur verður at hoyra.

Leif Petersen, byggifrøðingur, sum starvast á teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu, hevur teknað skúlan, og tað er tekniska deildin sum hevur havt um hendi alla projektering og eftirlitið við arbeiðinum.

Á samkomuni fer Leif at greiða frá, hvussu arbeiði at byggja nýggja skúlabygningin hevur gingið, og hann fer eisini at greiða frá, hvør hevur gjørt tey ymisku arbeiðini, nú komið er undir land.

Eftir hátíðarløtuna verður borðreitt við døgurða á Muntra í Fuglafirði til teirra, sum hava verið við í byggingini, býráðspolitikarum og lærarum, ið starvast við skúlan.

## Fegin skúlastjóri

Súni í Hjøllum, skúlastjóri við Fuglafjarðar skúla, sigur, at nýggi skúlabygn-ingurin er bygdur beint niðanfyri verandi skúla, nevniliga har skýlið áður stóð.

– Tá ið tú kemur inn í skúlagarðin, er gamli parturin av skúlanum á ovaru síðu og fyri framman og nýggi bygningurin á niðaru síðu.

Skúlastjórin fegnast um, at tiltrongda byggingin nú er komin undir land.

– Jú, tað verður ein fegin skúlastjóri, sum fríggjadagin fer at taka ímóti lyklunum til skúlan – vegna lærararnar og skúlabørnini, sum ganga við skúlan, sigur hann.

Súni hevur verið skúlastjóri við Fuglafjarðar skúla síðan 1989, men hann byrjaði longu at undirvísa á skúlanum í 1979, tá ið hann júst var liðugur við sína læraraútbúgving á Føroya Læraraskúla.

Sostatt hevur hann nú verið lærari í 25 ár og skúlastjóri í 15 ár.

– Fríggjadagurin verður ein stórur dagur hjá okkum, tí nú fáa lærarar og næmingar tær umstøður, vit leingi hava bíðað eftir.

## 700 fermetrar

Súni sigur, at nýggi skúlabygningurin er stívliga 700 fermetrar tilsamans. Hann er bygdur í tveimum hæddum. Niðara hæddin er úr betong, og hin ovara er úr timbri.

– Í kjallarahæddini eru tríggjar høvuðsstovur. Ein stova til motorlæru, sum eisini kann brúkast til jarnsmíð. Ein er til handverk og list, og seinasta stovan er til træsmíð.

Skúlastjórin vísir á, at øll kjallarahæddin soleiðis kann sigast at vera ein stórur verkstaður.

Í niðaru hæddini eru eisini wc'ir og rúm til útsúgving.

– Í ovaru hæddini eru fýra høvuðsstovur; har er bókasavn, stova til lívfrøði, alis- og evnafrøði og síðan er ein fyrilestrarsalur, har næmingarnir sita í ymiskum hæddum, sigur skúlastjórin, Súni í Hjøllum, at enda.

Við Fuglafjarða skúla ganga 360 skúlanæmingar úr 1. flokki og upp í 10. flokk.

Børn í Leirvík og Gøtu, sum fara úr 7. flokki, fara til Fuglafjarðar at ganga á framhaldsskúla.



*Súni í Hjøllum hevur verið skúlastjóri í Fuglafirði síðan 1989. Hann byrjaði sum lærari á skúlanum í 1979 –ella fyri 25 árum síðan*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Byrjaði í 2000

Skúlabyggingin í Fugafirði byrjaði seint á heysti í ár 2000.

Kristian Joensen í Fuglafirði hevði útgrevsturin, Jan Mohr í Fuglafirði stoypiarbeiði, og Svend Olsen í Gøtu hevur innilokað bygningin. Jan Mohr hevði eisini um hendi at gera bygningin lidnan innan. El-arbeiði hevur El-teknik í Leirvík gjørt, og Demich hevur gjørt rørarbeiði. Jóhan Larsen í Fuglafirði hevur gjørt snikkaraarbeiði, gólvarbeiði gjørdi Gólvbúni í Kvívík, og Hans Mohr í Fuglafirði gjørdi málaraarbeiði.

Nú byggingin er liðug, kostar nýggi skúlabygningurin í Fuglafirði einar 14,5 miljónir krónur. Enn er ymiskt eftir at gera rundan um bygningin, men hetta arbeiði verður nú gjørt.

Tað er Fuglafjarðar kommuna, sum hevur goldið alla byggingina, ið er framd í stigum. Alt arbeiði uttan útgrevsturin er útboðið útboðið so hvørt.



*Leif Petersen, byggifrøðingur, Jákup Frants Larsen, skrivari hjá Fuglafjarðar kommunu, Johan Heri Joensen, lærari og formaður í teknisku nevnd, Súni í Hjøllum, skúlastjóri og Sigurd Simonsen, býráðsformaður í Fuglafirði*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Skúlabørn í Fuglafirði høvdu einki ímóti at lata seg avmynda, tá ið Sosialurin vitjaði mikumorgunin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Kirkjan eigur at standa fast

**Kirkjan eigur at halda fast við brúðarvígslu, sum hon altíð hevur gjørt, sigur Bergur Debes Joensen, prestur. Um politikarar við lóg fara at broyta kirkjuliga ritualið, kann tað enda við, at kirkjan syndrast, metir hann**

BRÚÐARVÍGSLA
*Edvard Joensen*

Kirkjan skal framhaldandi víga fólk. Og tað skal vera mann og kvinnu, sum kirkjan altíð hevur gjørt, sigur Bergur Debes Joensen, sóknarprestur.

– Um tú ikki vígir yvirhøvur, er einki at visa á viðvíkjandi samlívinum millum mann og kvinnu, sigur hann.

Í Sosialinum mikudagin mælir John Myllhamar, trúboðari, til, at fólkakirkjan sleppur brúðarvígslunum, tí, sum støðan er í samfelagnum í dag, tykist minni og minni virðing at vera fyri hjúnalagnum, sigur hann. Tí metir hann ikki, at kirkjan skal standa model til eina kirkjuliga handling, sum eigur at vera heilag, men sum verður ov lítið vird.

Á tí økinum er Bergur Debes Joensen samdur við honum. Hjúnalagið er heilagt, og tað eigur tað eisini at vera, men kirkjan skal eisini í framtíðini víga fólk.



*Bergur Debes Joensen, sóknarprestur, heldur, at kirkjan skal standa fast við, tað, hon altíð hevur staðið fyri og eisini í framtíðini víga fólk í hjúnalag*

– Kirkjan má ikki bakka, men tosa týðuliga um, hvørjum hon stendur fyri. Skriftin lærir, at hjúnarlag millum mann og konu er ein skapanarskipan, sum er náttúrlig. Maður og kona eru skapt hvør til annan og ikki tvey av sama kyni. Kirkjan skal framvegis víga fólk og signalera, at hjúnalagið er heilagt. Hon skal víga mann og kvinnu, og tað skal bara vera einaferð, staðfestir Bergur Debes Joensen.

– Samsvar eigur at vera millum ritualið og sjálva vígsluna í fólkakirkjuni.

Hann leggur dent á, at tað kann ikki góðtakast, um politikarar við lóg fara at áleggja kirkjuni, at hon skal broyta ritualið, so onnur eisini kunnu giftast í kirkjuni.

– Um tað hendir, sigur Bergur Debes Joensen, vænti eg, at tað vera fleiri, sum fara at taka seg úr fólkakirkjuni. Sjálvur meti eg tað so álvarligt, at um hetta kemur sum bindandi ritual, síggi eg persónliga ikki aðrar møguleikar enn at leggja kragan.

Hann sigur, at uppskotið hjá John Myllhamar kann tykjast sum ein skilagóð loysn. Men kortini tykist tað sum ein kapitulatión. Og tað má kirkjan ikki gera.

Kirkjan skal vísa, at hon kennir bæði átrúnaliga og samfelagsliga ábyrgd, og heldur enn at halda undan, halda fast við tað, hon stendur fyri.

– Vit eiga ikki at grava okkum niður, men heldur finna loysnir, sum kunnu brúkast, sigur Bergur Debes Joensen, sóknarprestur.

Hann ásannar, at tað stendur ikki væl til á økinum í dag. Formenninir í stóru flokkunum á Fólkatingi hava saman við formanninum í kirkjuligu nevndini hjá Fólkatinginum signalerað, at tey meta tíðina vera komna til, at kirkjan giftir samkynd parløg.

Verður slíkt uppskot gjørt til lóg, metir Bergur Debes Joensen, at styttri er til skilnað millum kirkju og stat, enn tað hevur verið.

Men støðan er ikki góð, og útlitini eru enn verri, at kirkjan signalerar tað bíbilska hjúnarlagið, vísir hann á. Til dømis eru donsku biskuparnir ikki so sannførdir um, at kirkjan ikki skal broyta kirkjunnar ritual. Tað kunngjørdu teir í 1997, tá teir loyvdu – og royndu gudfrøðiliga at grundgeva fyri – at signa samkynd pør í fólkakirkjuni. Føroyski biskupurin tók tó ikki undir við hesum.

# Nýggi Smyril verður jólatrøll

**Hann verður enn meiri seinkaður enn hann longu er og hann kemur neyvan í sigling í ár, sigur tekniski leiðarin á Strandferðsluni**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nýggi Smyril kemur ikki í sigling í ár. Byggingin er nógv seinkað, men tað er onki, sum Strandferðslan kann gera við tað*

– Nýggi Smyril kemur ikki í sigling í ár.

Tað er tekniski leiðarin á Strandfersluni sannførdur um.

Magnus Magnussen hevur ikki fingið tað váttað frá sponsku skipasmiðjuni, sum byggir nýggja Smyril, at hann verður seinkaður.

Men nú hann akkurát er afturkomin til Spania eftir summarfrítíðina, staðfestir hann, at tað er so mikið nógv eftir at gera við skipið, at tað fer ikki at eydnast skipasmiðjuni at halda tíðarætlanina.

Upprunaliga skuldi nýggi Smyril verða liður 12. oktober. Men fyrr í ár varð greitt, at hetta fór ikki at halda, og nýggjur yvirtøkudagur varð settur til 31. oktober.

Men Magnus Magnussen sigur, at nú dugir hann at síggja, at tað er so mikið nógv eftir at gera, at heldur ikki tann tíðarætlanin fer at halda.

Hann fer nú at biðja leiðsluna á skipasmiðjuni um eina nýggja tíðarætlan. Men leiðslan er í feriu, so tað verður ikki fyrrenn seinni, at hann sleppur á tal við leiðsluna.

Sostatt veit hann ikki at siga, nær nýggi Smyril verður liðugur.

Men hann metir í øllum førum, at tað verður ikki í hesum árinum, at hann kann setast í sigling, og sostatt gerst nýggja suðuroyarskipið jólatrøll.

– Tað var eitt stórt vónbrot, tí vit høvdu miðjað eftir at fingið hann í sigling nú tíðliga í vetur, sigur hann.

Hann sigur, at tað arbeiðir rættiliga nógv fólk umborð á Smyrli.

Skipasmiðjan hevur havt møguleikan fyrr í summar at sett meiri fólk umborð fyri at fáa tíðarætlanina at halda.

– Men nú er tann møguleikin farin, tí nú eru bara tveir mánaðir eftir, til skipið skuldi handast.

Tað er eisini eitt mark fyri, hvussu nógv fólk kann arbeiða umborð, sigur Magnus Magnussen. Tað ber heldur ikki til at gera øll arbeiðini ísenn, tí hvørt má lagast eftir øðrum. og tá ið alt er liðugt, skulu allar tekniskar skipanir umborð roynast.

## Kann onki gera

Magnus Magnussen sigur, at tað er onki, sum Strandferðslan kann gera við hetta.

Strandferðslan hevur ein sáttmála at halda seg til. Og í tí sáttmálanum er eisini lagt upp fyri seinkingum.

– Tað er Skipasmiðjan, sum byggir skipið og vit hava bara eftirlitið.

Kortini er tað so, at verður skipið seinkað meiri enn ein mánaða, kemur Skipasmiðjan undir dagbøtur.

Tað vil siga, at frá 1. desember kemur skipasmiðjan undir dagbøtur. Hesar dagbøturnar eru einar 100.000 krónur um dagin í fyrstuni, men tær veksa, meiri skipið verður seinkað.

Kortini heldur Magnus Magnussen, at tað, sum hevur størstan týdning, er, at vit fáa eitt gott skip, tá ið tað er liðugt.

– At byggingin er seinkað er tað, sum kann henda. Men tað týdningrmesta er, at vit fáa eitt gott skip – og tað fáa vit, tí nýggi Smyril verður eitt gott skip, sigur hann.

At nýggi Smyril verður seinkaður ber samstundis í sær, at gamli Smyril kann ikki fara av landinum.